**Suðurstreymoy + Sandoy:**

Anna Simonsen
Tlf. 234574
T-post: lsansi@ls.fo

Ingun Durhuus
Tlf. 234579
T-post: lsingudu@ls.fo

Elisabeth Hansen
Tlf. 234679
T-post: lselihs@ls.fo

**Norðstreymoy + vesteri armurin á Eysturoy + Vágoy:**

Dorthea Ellingsgaard
Tlf. 234670
T-post: lsdorel@ls.fo

Morid Jóhannesen
Tlf. 234578
T-post: lsmorjo@ls.fo

Joan Danberg
Tlf. 23234672
T-post: lsjoada@ls.fo

**Eysturoy:**

Borghild á Fløghamri
Tlf. 234671
T-post: lsborfl@ls.fo

Maibritt Jacobsen
Tlf. 234575
T-post: lsmaija@ls.fo

**Norðoyggjar:**

Mirjam Matras Heinesen
Tlf. 234576
T-post: lsmirma@ls.fo

Sigun Dalsgaard Hansen
Tlf. 234577
T-post: lssighn@ls.fo

**Suðuroy:**

Bodil Finnsson
Tlf. 234668
T-Post: bodil.finnsson@ls.fo

Gunnhild Mortensen
Tlf. 234667
T-post: gunnhild.mortensen@ls.fo

**Leiðari – Ambulant vaksin & Økispsykiatri:**

Birgit Andersen
Tlf. 234557
T-post: biran@ls.fo

**Varaleiðari:**

Randi Borðoy
Tlf. 234669
T-post: randi.bordoy@ls.fo

Sjúkrahúsverk Føroya

Psykiatriski depilin, Tel. 304500 www.ls.fo

Sjúkrahúsverk Føroya



# Økispsykiatri

Ein tænasta í nærumhvørvinum, til fólk við sálarsjúku

## Hvat er Økispsykiatri

Vit eru ein partur av føroyska sjúkrahúsverkinum, ið arbeiðir við psykiatri í nærumhvørvinum. Vit veita ambulant viðgerðartilboð til vaksin, og virka í dagtímunum.

Høvuðsuppgávan er at hjálpa fólki við sálarsjúkum sum eitt nú skizofreni, øðrum psykosum, bipolerari sjúku, tungum depressiónum og svárum ótta.

### Vit veita

- Stuðul til at skipa dagin
- Stuðlandi samrøður
- Kognitiva terapi
- Undirvísing í tínari sjúku
- Uppfylgjan av heilivágsviðgerð
- Sosial førleikavenjing
- Fyribyrgja afturstig og arbeiða við heilsufremjan
- Og annað í samráð við teg

## Hvør kann ávísast til viðgerð í nærumhvørvinum

Ert tú 18 ár og eldri, kanst tú seta teg í samband við egnan lækna, ið kann senda eina ávísing til psykiatriska depilin. Har vera ávísingarnar viðgjørdar og beindar til rætta toymið.

Hevur tú verið innlagdur á psykiatriska deplinum, kann ein eftir útskrivan vera tilknýttur til Økispsykiatriina.

Ert tú longu í viðgerð á Psykiatriska deplinum, kann ábyrgdarhavandi lækni ávísa til Økispsykiatriina.

## Arbeiðsháttur

Tá ið vit hava fingið ávísingina, seta vit okkum í samband við teg. Tú verður bjóða/ur til eina innleiðandi samrøðu, saman við 2 sjúkrarøktarfrøðingum. Henda samrøða kann fara fram heima hjá tær ella á skrivstovuni hjá Økispsykiatriini.

Aftaná hesa samrøðu verður mett um hvussu víðari skal farast fram. Um mett verður at tú skal halda fram í Økispsykiatriini, fært tú tilluta ein kontaktpersón.

Tíðin og títtleikin til samrøður verður avtalað ímillum teg og tín kontaktpersón.

## Vit samstarva við

Vit hava tætt samstarv við psykiatara, umframt samstarv við aðrar fakbólkar á psykiatriska deplinum.

Við loyvi frá tær, kunnu vit eisini samstarva við m.a.

- Almannaverkið
- Kommunulæknar
- Heilsu og umsorganartænastur
- Gigni
- Og onnur

Ynskiligt er at samstarva við avvarðandi. Avvarðandi kunnu vera familja, vinir ella onnur menniskju, ið kunnu stuðla tær í at gjøgnumføra viðgerðina.

## Hvussu kemur tú í samband við okkum

Vit kunnu hittast gerandisdagar frá kl. 8.00 – 16.00 - sí kunning á baksíðu.

Um tørvur er á psykiatriskari hjálp eftir kl. 16.00 má ringjast til læknavaktina á tlf. 1870